# Undirvísingargongd til *Lítli Virgar*




**Ole Lund Kirkegaard**

***Lítli Virgar***

Myndir: Ole Lund Kirkegaard
Týtt: Pauli Nielsen
Bókadeild Føroya Lærarafelags 2003

**Um bókina**

Ole Lund Kirkegaard hevur skrivað og teknað bókina um lítla Virgar. Skemtiliga verður sagt frá gerandisdegnum hjá lítla Virgari og vinmonnunum hjá honum, Oskari og Karl Emili. Tað hendir eitt sindur av hvørjum, tá ið hesir tríggir eru saman, og viðhvørt gerast tey vaksnu nokk so ørg inn á teir.

Dreingirnir ganga í skúla saman, eisini har hendir ymiskt. Sumt, sum dreingirnir siga frá, kann vera eitt sindur ringt at gera av, um tað er soleiðis, sum dreingirnir siga tað vera.

Bókin hevur nøkur ár á baki, hon kom út í 1967 og er týdd til føroyskt í 2003, men hon kann kortini vera stuttlig at lesa.

**Uppgávur**

Anni Sørensen hevur gjørt uppgávurnar til *Lítli Virgar*.

Uppgávurnar eru ætlaðar 4.-5. flokki. Arbeitt verður eftir leistinum: Áðrenn tit lesa, meðan tit lesa, og tá ið tit hava lisið. Flestu uppgávurnar eru gjørdar til arbeiðið, meðan lisið verður.

Dentur verður lagdur á mállæru, serliga verður nokk so fitt arbeitt við navnorðum, sagnorðum og lýsingarorðum.
Arbeitt verður eisini við at skilja lisna tekstin og við margháttaðum teksti (orð og mynd). Í onkrum uppgávum skulu næmingarnir tekna.
Stavseting, teknseting og fagurskriving verða vand.

Uppgávurnar egna seg væl til sjálvstøðugt arbeiði, men kunnu eisini gerast í bólki.

Vit meta, at tað tekur umleið 20 undirvísingartímar at lesa bókina og gera uppgávurnar. Skift kann vera ímillum, at lærarin lesur fyri næmingunum, meðan tey fylgja við í egnari bók, at næmingarnir lesa í bólki, ella tey lesa ein og ein.